Tekniski Skúlin Klaksvík

# Køksleiðari til Skúlaheimið

Fyri komandi skúlaár verður søkt eftir avloysara fyri køksleiðara á Skúlaheiminum. Køksleiðarin hevur ábyrgdina av øllum virkseminum í kantinuni og køkinum og eru uppgávurnar m.a.:

- at matgera og útflýggja
- tilrættalegging av øllum virkseminum í køkinum
- umsiting av øllum fíggjaligum viðurskiftum í køkinum.

Vit vænta, at tú hevur viðkomandi útbúgving, ert fyrikomandi yvirfyri næmingum og hevur ans og hugflog, at gera kantinuna til eitt spennandi matarstað fyri ungfólk.

Vit seta stóran prís uppá samstarv og liðiligheit. Starvið verður sett eftir sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

Tikið verður við starvinum 7. august 2006.

Skrivlig umsókn við prógvum skal sendast skúlanum innan 29. mai.

Áhugað kunnu venda sær til Rúna Heinesen, skúlastjóra.

**Tekniski Skúlin í Klaksvík**
Postboks 20
Fo-700 Klaksvík

*Tekniski Skúlin í Klaksvík er sjálvognarstovnur og vinnuskúli. Á skúlanum eru miðnámsútbúgvingarnar, HT og SIT, og skúlagongd fyri handverkslærlingum innan el-, maskin- og timbur yrki.*
*Aðalmál skúlans er, at vera kendur fyri eitt gott skúlaumhvørvi, fakliga og námsfrøðiliga menning.*

Tekniski Skúlin Klaksvík

# Lærarar til HT, SIT og Yrkisútbúgvingar

Søkt verður eftir undirvísarum til lærugreinirnar:

- Yrkislæra innan el-, maskin og timbur- og snikkarayrki.
- Stødd-, alis- og evnafrøði á B- og C-stigi Statik&Styrkilæra á C-stigi. Førleiki, t.d. verkfrøðingur.
- Miðlar á A- og C-stigi
- Føroyskt C-, føroyskt E- og enskt E-stig. Íalt uml. 16 tímar/viku.

Lutvís er talan um tvørfakliga undirvísing og samstarv í toymi.

Setanartreytir eru eftir sáttmála í millum FTL og Fíggjarmálaráðið.

Tikið verður við starvinum frá august 2006.

Skrivlig umsókn við prógvum skal sendast skúlanum innan 29. mai.

Áhugað kunnu venda sær til Rúna Heinesen, skúlastjóra.

**Tekniski Skúlin í Klaksvík**
Postboks 20
Fo-700 Klaksvík

*Tekniski Skúlin í Klaksvík er sjálvognarstovnur og vinnuskúli. Á skúlanum eru miðnámsútbúgvingarnar, HT og SIT, og skúlagongd fyri handverkslærlingum innan el-, maskin- og timbur yrki.*
*Aðalmál skúlans er, at vera kendur fyri eitt gott skúlaumhvørvi og fakliga og námsfrøðiliga menning.*

# Tekniskur ráðgevi til Vágs kommunu

Eitt starv sum ráðgevi á Teknisku deild hjá Vágs kommunu er leyst at søkja til setan 01. juni 2006.

Tekniski ráðgevin hevur dagligu leiðsluna av Teknisku deild hjá Vágs kommunu og verður skrivari hjá Teknisku nevnd.

**Arbeiðsuppgávurnar verða m.a. hesar**

- tilrættalegging og stýring av kommunalum uppgávum
- at standa fyri og menna skrásetingararbeiðið av tekniskum leiðingum
- málsviðgerð og ráðlegging
- endurskoðan/víðkan av verandi byggisamtykt/býarskipan
- projektering og eftirlitsarbeiði
- at standa fyri útbjóðingum og gera tilmæli til avvarðandi nevndir í býráðnum
- uppmátingar og avseting

**Kommunan ynskir, at tú**

- hevur viðkomandi útbúgving á økinum s.s. tekniskur teknari, maskinmeistari el.
- hevur evni at arbeiða sjálvstøðugt
- hevur góðan telduførleika og dugir at brúka skrivi- og tekniforrit
- hevur góð samskiftisevnir, bæði muntliga og skrivliga
- hevur góð samstarvs- og tillagingarevni og dugir væl við viðskiftafólki

**Lønar- og setunarviðurskifti**

- Starvið er fulltíðarstarv og hevur tilvísing til Teknisku nevnd og borgarstjóran
- Starvið verður sett sambært sáttmála millum KAF og avvarðandi yrkisfelag

Vágs Kommuna skilar sær rætt til at velja millum umsóknirnar ella onga at taka.

Umsóknir saman við prógvum og upplýsingum um lívsroyndir verða í seinasta lagi tann 22. mai 2006 kl. 12.00 at senda til:

**Vágs kommunu**
Tekniska nevnd
Vágsvegur 22
900 Vágur

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Kirstin Strøm Bech, borgarstjóra á tlf. 373024, ella til Danjal Bjarkhamar, formann í Teknisku nevnd á tlf. 373755.

**Vágs kommuna**

# Aðalfundur

Magistarafelag Føroya hevur ársaðalfund fríggjadagin 19. mai 2006 kl. 17.00.

Fundurin verður í Ovastovu í Nóatúni.

Skrá sambært viðtøkum felagsins.

Umboð fyri Føroya Lívstrygging koma at greiða frá tryggingarviðurskiftum.

Møti fjølment.

**Nevndin**

# AFS Føroyar
**Altjóða ungdómsumskifti**

Postboks 1351 - 110 Tórshavn - Tel 312991 / 223130
eholm@post.olivant.fo - www.afs.dk

## Okkum tørvar vertsfamiljur skúlaárið 2006 - 2007



**Í juli koma fleiri vónríkir ungdómar úr ymsum londum til DK/Føroyar, tó uttan at hava eina vertsfamilju at koma heim til**

## Nú hava *tit* møguleikan

**Kunningarfundur verður sunnudagin 7.mai 2006 kl. 15.00 í samkomuhøllini á Føroya Studentaskúla í Hoydølum.**
Fundurin, har AFS'arar greiða frá royndum teirra, er bæði um vertsfamilju- og sendiprogrammið.
Øll eru vælkomin!

**Gev familju tykkara nýggjan íblástur uttan úr heimi**

**www.afs.dk**


# GSM telefonir &

## GSM & VHF telefonir v.m til skip og bátar

**Storno**
SØLA & TÆNASTA

Handan Á 6 · Tórshavn
Tel 31 44 14 · Fax 31 80 45
storno@post.olivant.fo


CLUB KAGGIN BAR

# Frítíðarfelagið Kaggin

Aðalfundurin sum var lýstur at verða 6. mai er útsettur til 20. mai kl. 16.00 í hølum felagsins.

**Nevndin**